# Ímóti floghavn

Grønlendski politikarin Aqqaluk Lynge leggur seg nú út í orðaskiftið í Bretlandi um at útbyggja ta stóru Stansted-floghavnina í London. Aqqaluk Lynge, sum er formaður í altjóða inuittafelagsskapinum, sigur, at tað fer at seta uppaftur meiri ferð á hitavøksturin á Jørðini, um Stansted-floghavnin verður bygd út. Við bretska blaðið Sunday Times sigur hann, at útbyggingin fer serliga at ávirka umstøðurnar í póløkinum og fólkið har.



# Ólógliga garnaveiðu

Leygarnáttina varð garnaskipið Vesturland tikið fyri ólógliga veiðu á Ytrabanka. Tað segði Útvarpið í morgun. Tjaldrið tók skipið um eitttíðina leygarnáttina, tí skipið setti gørn á einari leið, sum er grynri enn 380 metrar, sum ikki er loyvt.

Útvarpið skrivar á heimasíðu sínari, at Fiskiveiðueftirlitið á sattelitti sær, hvar skipini liggja, og tí varð farið at kannað, hvat Vesturland tókst við.

Mett verður, at Vesturland hevði sett 888 gørn, tá ið Tjaldrið kom á staðið, og veiða og reiðskapur eru gjørd upp til 255.000 krónur.

Báðir skipararnir fáa bót. Skiparin, sum setti gørnini, fær eitt sektarkrav, sum ljóðar á 120.000 krónur, og hin skiparin fær 52.000 krónur í bót.

Randi Ward í fyrilestri:

# Kvinnan stýrdi arbeiðinum

**Tað var týðiligt, at Randi Ward hevði sett seg ógvuliga væl inn í alt viðvíkjandi lívinum hjá Olevinu Joensen, ið var evni, sum hon hevði valt at skriva sína høvuðsuppgávu um**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Gott og væl hálvthundrað fólk vóru møtt upp í Roynd-arhúsinum í Nólsoy fríggjakvøldið at lurta eftir fyrilestri, sum amerikanska lesandi við Søgu- og Samfelagsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya, Randi Ward, helt við støði í høvuðsuppgávu síni.

Og tey fóru vælnøgd – og ikki minst – ógvuliga imponerað avstað aftur tveir tímar seinni.

Sjálvt fólk, sum meiri ella minni vóru vaksin upp við Olevinu, vistu ikki so nágreiniliga og djúpt, hvussu lív hennara var farið fram. Tað var líka týðiligt, at Olevina – millum manna nevnd Vina – hevði latið fullkomiliga upp fyri Randi og sagt henni sínar mest inniligu og privatu tankar.

Í fyrilestrinum sjálvum var Randi meiri «generell«, men aftaná var møguleiki at spyrja, og tað vóru fleiri, sum nýttu høvið til tað, og tá fór hon niður í smálutir sum vístu, hvussu væl hon var vitandi um tað, hon tosaði um.

Okkum, sum dagliga búgva í Nólsoy, er greitt, at Vina hevur verið ógvuliga hart rakt av lagnuni. Hon hevði ógvuliga stórt stríð við manninum, tá hesin gjørdist sjúkur av Parkinson sjúkuni. Vitanin var ógvuliga avmarkað um hesa sjúkuna tá, og læknarnir royndu enntá at skurðviðgera mannin í eini roynd at gera hann frískan. Í dag vita vit, at tað als ikki ber til at skurðviðgera fyri Parkinson.

### Mist tveir synir

Men hóast hetta, so hevur Vina altíð verið eitt satt lívsstykki, altíð glað og positiv, og hevur í ríkiligt mát tikið lut í bygdalívinum, ikki minst sum kokkur til bæði gaman og álvara.

Longu sum átta ára gomul tór hon út at arbeiða, fyri at hjálpa familjuni. Hetta var heldur ikki nakað óvanligt tá, tí tíðirnar gjørdu, at øll máttu hjálpa til í húsarhaldinum. Seinni mátti hon sum tólv ára gomul ansa yngru syskjunum, nakað, sum heldur ikki var óvanligt tá á døgum.

Hóast Vina soleiðis er lítil av vøkstri, so hevur hon eitt ógvuliga stórt hjarta, so tað var heilt náttúrligt fyri hana at taka ommusystir sína inn, tá hendan gjørdist húsvill. Hon tók sær av henni til hennara doyggjandi dag, sum kom, tá Vina sjálv mátti til Havnar á sjúkrahús at føða yngstu dáttrina – sum hon valdi at kalla upp eftir ommusystrini, Helena, vanliga nevnd Lena.

Vina virkaði sjálv sum jarðamóðir, eitt starv, sum meiri ella minni gekk í arv. Men tá lógaráseting kom um at møður skuldu eiga á sjúkrahúsunum, fall hetta serliga bygdastarv burtur.

Seinni í lívinum skuldi Vina so eisini kenna sorgina av at missa ikki bert ein, men tveir synir á sjónum. Báðir druknaðu við Føroya strendur, hóast báðir høvdu mangan brattan farið á langferð við fiskiskipum við New Foundland og aðrar fjarskotnar strendur.

Villy druknaði í Vágsbotni, meðan navnframi Ove Joensen sum vit minnast druknaði á Skálafjørðinum í blikastilli á heysti 1987.



*Fleiri enn 50 fólk vóru og lurtaðu eftir fyrilestrinum hjá Randi Ward fríggjakvøldið*

Jóhan Hendrik Winther Poulsen:

# Randi hevur verið sera nærløgd

**Fyrilesturin ber boð um, at Randi hevur sett seg rættiliga væl inn í føroysk viðurskifti og inn í lívsháttin hjá konufólki í Føroyum**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jóhan Hendrik Winther Poulsen er ikki hvør sum helst, tá tað kemur til føroyska mentan. Tað var tí ógvuliga áhugavert, at hann var millum teirra, sum vóru komin til Nólsoyar fríggjakvøldið at lurta eftir fyrilestrinum hjá Randi Ward um lívið hjá Olevinu Joensen.

Hann heldur tað er merkisvert, sum hon hevur fingið nógv burturúr tíðini, hon hevur lisið í Føroyum.

- Eg haldi, at hon hevur verið sera nærløgd, tá ið ræður um at seta seg inn í føroyska mentan og mentanarlív í breiðum høpi. Fyrilesturin ber boð um, at Randi hevur sett seg rættiliga væl inn í føroysk viðurskifti og inn í lívsháttin hjá konufólki í Føroyum. Hon hevur eisini livað seg sera væl inn í bygdalívið og hevur fatað føroyska mentan ógvuliga væl. Tað er áhugavert, at hon er komin heilt úr USA og higar til lands at kunna seg um fólkalív og mentan, segði Jóhan Hendrik W. Poulsen.

### Sera áhugavert

Randi Ward nevndi, tá hon varð spurd, at hon nú fer til Spania at arbeiða og seta seg inn í teirra metnan og mál. Og hon vísti á, at hon ætlaði sær at nýta ta vitan, hon hevði fingið í Føroyum sum grundarlag fyri komandi uppgávum.

Jóhan H. W. Poulsen var rættiliga bergtikin av tí, sum Randi hevði fingið burtur úr her heima. Hann sigur, at hann hevur hitt Randi áður, men hevur ikki havt nógv við hana at gera sum so.

Eg helt, at eg mátti fara út at lurta eftir fyrilestrinum, sum eg haldi var sera áhugaverdur. Tað er eisini áhugavert, at Randi ætlar at nýta ta vitan, hon hevur nomið sær í Føroyum, í einum størri høpi, segði Jóhan Hendrik Winther Poulsen.



*Jóhan Hendrik Winther Poulsen var hugtikin av fyrilestrinum*

Egon Hansen:

# Lýsingin neyv og d

**Egon Hansen er nólsoyingur og uppvaksin í oynni. Hann hevði leitað sær til Nólsoyar hetta kvøldið, og hann var ógvuliga bergtikin av fyrilestrinum hjá Randi Ward**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av fróðarmonnunum, Nólsoy hevur fostrað, er Egon Hansen. Egon er kendur fyri millum annað at hava skrivað bókina um kirkjuna í Nólsoy, »Kirkjan á tanganum«.

Í dag býr Egon Hansen í Havn, og hann var ein av teimum um fimtan fólkunum, ið høvdu lagt leiðina til Nólsoyar fríggjakvøldið at lurta eftir fyrilestrinum hjá Randi Ward. Og hann var avgjørt væl nøgdur, tá vit hittu hann eftir fyrilesturin.

Egon Hansen sigur, at Randi í sínum fyrilestri nam við viðurskifti, hann ikki væntaði, at hon fór at umrøða.

- Eg væntaði, at hon fór at lýsa Vinu, sum eina vanliga fiskimannakonu við kúgv í kjallaranum. Men lýsingin var nógva meira neyv og djúp. Hon lýsti Vinu sum eina sálarsterka og sera raska kvinnu, sum hevur verið ígjøgnum nógv í lívinum, bæði gleði, stríð og sorg. Tá ið stríðið var mest og sorgin størst,